## Grønland ikki í ES

Kuupik Kleist, landsstýrisformaður, hevur einki ímóti at kanna treytirnar fyri grønlendskum limaskapi í ES, soleiðis sum Demokratarnir hava skotið upp. Men landsstýrisformaðurin ger kortini púra greitt, at Grønland fer ikki upp í ES aftur. Kuupik Kleist vísir á, at undir valstríðnum fyrr í ár segði hann, at hann var til reiðar at kanna, um fyrimunir kundu vera við ES-limaskapi. Men tað merkir ikki, at vit eru fyri limaskapi, sigur Kuupik Kleist við KNR. Í áttatiárunum gekk flokkurin hjá Kleist, Inuit Ataqatigiit, á odda í stríðnum at fáa Grønland úr EF. Tað hendi í 1985.



## Medvedev til Danmarkar

Í sambandi við veðurlagsfundin í New York hitti Lars Løkke Rasmussen, forsætisráðharri, russiska forsetan, Dmitrij Medvedev, og har nýtti hann høvi til at bjóða Medvedev til Danmarkar á almenna vitjan í apríl næsta ár. Viðurskiftini millum Danmark og Russland kølnaðu nógv í 2002, tá Danmark sýtti fyri at útflýggja kekenska andstøðupolitikaran Akhmed Sakajev. Lars Løkke Rasmussen sigur við DR, at hann hevur ikki biðið Russland um umbering, men at tað er umráðandi at hava góð viðurskifti við russar, tí Russland kann fáa stóran týdning á veðurlagsráðstevnuni í Keypmannahavn í desember.

## Hava ikki tikið støðu

**Skipara- og Navigatørfelagið og Maskinmeistarafelagið hava ikki tikið støðu til, um sáttmálin við Reiðarafelagið skal sigast upp**

SÁTTMÁLA-SAMRÁÐINGAR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Hvørki Skipara- og Navigatørfelagið ella Maskinmeistarafelagið, hava enn tikið støu til, um teirra sáttmáli við Reiðarafelagið skal sigast upp.

Sum tað sæst í aðrari grein her á síðuni, er tað greitt, at Fiskimannafelagið hevur sagt sáttmálan upp.

Men tað verður ikki fyrrenn einaferð í næstu viku, at hini bæði manningarfeløgini fara at taka støðu til spurningin.

Sáttmálin hjá navigatørunum og maskinmeistarunum gongur út 31. Desember.

Men sum tað skilst á formonnunum í báðum feløgunum, er tað heldur ikki greitt, um sáttmálin verður sagdur upp.

- Vit eru greiðir yvir, at støðan hjá fiskiflotanum er sera vánalig, so vit mugu gera upp við sjálvi, hvat endamálið við at siga sáttmálan uppm skal vera, sigur Páll Hansen, formaður í Maskinmeistarafelagnum skal vera.

Hann er eisini greiður yvir, at verður sáttmálin sagdur upp, verður neyvan talan um tær stóru ábøturnar, men talan verður helst ikki um meiri enn onkrar dagføringar, leggur hann afturat

Støðan er ikki serliga góð, vilja hava nakað afturat, so er hetta nokk ikki rætta løtan

Hesum er Eyðstein Djurhuus, formaður í Skipara- og Navigatørfelagnum samdur.

- Vilja vit hava ábøtur á sáttmálan, er hetta nokk ikki tann frægasta løtan at fáa semju um nakað slíkt, sigur hann.

# Fiskimenn vilja hava betri løn og meiri frí

**- Vit fara at royna a fáa reiðararnar at góðtaka, at fiskimenn skulu hava betri hýru, men vit vilja eisini hava meiri frítíð, sigur Jan Højgaard, nú Fiskimannafelagið hevur sagt sáttmálan við Reiðarafelagið upp**

SÁTTMÁLA-SAMRÁÐINGAR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Fiskimenn vilja hava nú hava frí á jólum og teir vilja eisini hava hýruprosentið upp*

Fiskimannafelagið heldur, at fiskimenn fáa ov lítið í løn.

Tað sigur Jan Højgaard, formaður í Fiskimannafelagnum.

Fiskimannafelagið hevur sagt sáttmálan við Reiðarafelagið upp til at fara úr gildi tann 30. november.

Sostatt skulu samráðingar verða um nýggjan sáttmála í næstum.

Jan Højgaard sigur, at enn hevur nevndin í Fiskimannafelagnum ikki verið saman á fundi og sostatt hevur felagið heldur ikki úgreinað krøvini til Reiðarafelagið í sambandi við tær komandi samráðingarnar.

Men kortini staðfestir formaðurin í Fiskimannafelagnum, at fiskimenn eru av teirri áskoðan, at hýruprosentið er nakað lágt.

- Tí er onki at ivast í, at nú samráðingar verða aftur, fara vit at royna at fáa hýruprosentið upp, sigur hann.

### Meiri frítíð

Hann leggur afturat, at eitt, sum fer at viga tungt í samráðingunum, er, at fiskimenn vilja hava meiri frítíð.

Í hesum sambandi fer Fiskimannafelagið at krevja, at fiskimenn skulu fáa fríð í eina tíð á jólum.

Hann ásannar, at tað longu nú er vanligt, at tey flestu skipini liggja á jólum og nýggjárunum kortini.

- Tað veit eg væl, men vit vilja hava tað staðfest í sáttmálan, sigur hann.

Hinvegin er formaðurin í Fiskimannafelagnum fullgreiður yvir, at at tað eru ringar tíðir í fiskivinnuni, so hann veit eisini, at krøvini kunnu ikki vera ov hørð.

# Reiðarar ikki ráð til kollveltandi broytingar

**Formaðurin í Reiðarafelagnum staðfestir, at støðan hjá fiskiflotanum er so vánalig, at talan kann í mesta lagi verða um smávegis dagføringar, nú Fiskimannafelagið hevur sagt sáttmálan upp**

SÁTTMÁLA-SAMRÁÐINGAR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Uttan iva er tað okkurt, sum Fiskimannafelagið vil hava broytt.

Viberg Sørensen, formaður í Føroya Reiðarafelag, staðfestir, at Fiskimannafelagið hevur sagt sáttmálan upp til at fara úr gildi 30. november.

Men hann staðfestir samstundis, at hann hevur onki frætt um, hvørji krøv Fiskimannafelagið hevur til ein nýggjan sáttmála.

- Men tá ið sáttmálin er sagdur upp, er tað ivaleyst, tí at Fiskimannafelagið vil hava onkrar broytingar.

Viberg Sørensen sigur, at Reiðarafelagið ætlaði ikki at siga sáttmálarnar við manningarfeløgini upp.

Reiðarafelagið heldur nevniliga ikki, at hetta er stundin til at gera nakrar ábøtur, sum føra við sær, at skipini fáa størri útreiðslur.

- Hetta er avgjørt ikki stundin til at áleggja fiskiflotanum størri útreiðslur, staðfestir hann.

### Byrja á nullpunktinum

Hann væntar eisini, at teir í Fiskimannafelagnum er greið yvir støðuna í fiskiflotanum og tí væntar hann heldur ikki, at felagið fer at krevja nakrar stórvegis broytingar, men at talan í mesta lagi verður um at fáa onkrar dagføringar.

Hinvegin sigur hann eisini, at nú sáttmálin er uppsagdur, er tað ikki bara Fiskimannafelagið, sum kann seta krøv fram.

- Tá ið farið verður undir samráðingarnar, byrja báðir partar á null punktinum og tá kunnu báðir partar seta krøv.

Einaferð var tað ógvuliga umráðandi fyri Reiðarafelagið, at fáa fiskimenn at betala ein part av oljuni hjá skipunum. Er tað hugsandi at tað kravið verður sett fram aftur nú.

- Nei, tað vænti eg ikki, hóast oljan er ógvuliga tyngjandi fyri raksturin. Men sum eg havi sagt: Tá ið farið verður undir samráðingarnar, byrja báðir partar við reinari talvu, so tað er ikki til at vita, hvat kemur upp á vegnum, sigur Viberg Sørensen.